# Umráðandi

Mest umráðandi í stríðnum móti rottu, eru tær fráboðanir, ið kommunan fær frá borgarunum. Tí er umráðandi, at tann ið sær rottu ella farvegin eftir rottu, beinanvegin vendir sær til Miðlan hjá Klaksvíkar kommunu. Skal rottutýningin eydnast til fulnar, eigur fólk við serkunnleika at skipa fyri.

Lógin áleggur hvørjum einstøkum ognara í mestan mun at avmarka livimøguleikarnar hjá rottu á ogn síni. Hetta merkir millum annað, at grundøki, hús og innleggingar, t.d. kloakk, skulu vera í so góðum standi sum yvirhøvur gjørligt. Harvið minka møguleikarnir hjá rottuni at fáa fastatøkur.

Lógin áleggur somuleiðis kommunum at skipa fyri ókeypis týning av rottum. Tað merkir, at hvør einstakur, ið hevur trupulleikar av rottu, kann venda sær til kommununa um hjálp og samstundis fáa vegleiðing um, hvussu best verður byrgt upp fyri rottum.

## FRÁBOÐAN

Um tú hevur trupulleikar av rottum ella hevur sæð rottu, skal tú venda tær til Miðlan.

Miðlan avgreiðir tína fráboðan.

Kommunali rottufangarin setir seg síðan í samband við teg um vitjan.

## MIÐLAN

Nolsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tel. 41 00 00

Stephanssons Hús

KLAKSVÍKAR KOMMUNA



# ROTTUR



KLAKSVÍKAR KOMMUNA





### Føroyska rottan

Vanliga rottuslagið í Føroyum er brúna rottan, á látínskum Rattus norvegicus. Onkuntíð vitjar eisini svarta rottan, Rattus rattus. Svarta rottan kemur við fremmandum skipum, men megnar ikki at yvirliva leingi í føroyska umhvørvinum.

# Hvussu verjir ein ogn sína á bestan hátt?

Burturkast og órudd uttandura eigur at verða burturbeint. Byggitilfar o.a. eigur at verða stáplað við frástøðu frá lendinum so langt frá bygningum sum gjørligt.

Fóður og matleivdir eiga ikki at liggja og flóta uttandura. Tílíkt rusk eigur at verða gjørt til sankutøð ella at latast ruskinnsavningini.

Slógv og burturkast frá slakti eigur at verða koyrt á Kommunala ruskplássið.

Tveit ikki rusk í náttúruna!

Um tú hevur hønur ella annan flogfenað á ogn tíni, ella um tú gevur fuglum ella villkøttum, mást tú ansa væl eftir ikki at geva ov nógv. Vandin fyri rottum er í slíkum førum stórur.

Gev ikki fuglum meiri enn etið verður ein dag. Fá tær fóðurbretti til fuglarnar.

## Innandura

Sjálvt so smá hol sleppur rottan ígjøgnum.



Rivur og hol í bygningum eiga tískil at verða umvæld. Til dømis kunnu holini stappast við høsnaneti, áðrenn stoypt verður. Ventilatiónsristir eiga at vera festar væl og vera av tilfari, ið rotta ikki sleppur ígjøgnum. Hol í veggjum og múrum til kaðalar, rør o.l. eiga at verða vard við høsnaneti ella plátu. Hurðar og vindeygu til lofts- og kjallararúm, ið ikki verða nýtt, eiga at verða latin aftur. Frárensl eiga at vera tøtt og brot eiga at verða umvæld beinanvegin.

"Vegleiðing fyri sethúsakloakkir" fæst í Miðlan.

## Hvussu veit ein, at vandi er á ferð?

Rotta er stygg og varlig og ger oftast um seg um náttina. Tað er ikki ofta at fólk varnast livandi rottu. Sæst rotta í dagslýsi, er tað tekin um, at nógv rotta er til. Uttandura verður rotta ofta avdúkað í holum í lendinum. Í óbygdum øki er hol við grevstrartilfari ofta tekin um rottu. Eitt hol uttan grevstrartilfar nærhendis kloak-kleiðingum er ofta tekin um kloakkskaða.

Um rotta er leingi innandura, sæst farvegur á bjálkum, gólvi, veggjum og líknandi støðum. Rottan letur eftir seg brúnliga slóð av landi og kertlavági. Rottan nýtir hesa slóð at miða seg eftir.

Um náttina kann skavan og krutlan á loftinum og millum skins og hold stava frá rottum, men oftast er tað bara tað rottan leggur eftir sær



sum sæst - serliga trekkurin. Hann sær soleiðis út:



Til samanberðingar sær músatrekkur soleiðis út.